# HEILSANIR



**Til mína elskaðu mammu**
Tillukku til tín við 80 ára degnum 17. nov. Takki tær tað tú hevur verið fyri meg, og ert fyri meg. Biði um Guð má ríkliga signa teg.
**Maiken**



**Góða mamma og vermamma**
Hjartaliga tillukku við tínum runda degi 16. nov. Gleða okkum at vera saman við tær hendan dag. Takk fyri alla hjálp tú gevur okkum.
**Heilsan Eimee og Henry**




Øllum tykkum sum gleddu okkum á diamantbrúdleypsdegi okkara, og gjørdu okkum dagin so hugnaligan, takka vit hjartaliga.
**Elna og Jacob**



**Góða elskaða omma**
Tillukku til tín við 80 ára degnum. Takk fyri alt tú hevur verið fyri meg og ert fyri meg. Gud signi teg.
**Jákup**



**Góði Martin**
Hjartaliga tillukku við føðingardegnum... við takk fyri mangar góðar og hugnaligar løtur saman. Alt tað besta í framtíðini.
**Russig**



**Góða omma**
Hjartaliga tillukku við 60 ára degnum. Takk fyri alt tú ert fyri okkum. Vit elska teg.
**Ynskir Solveig, Fríði og Harry**

Sosialurin
Heilsanir
kr. 30,-

**Gevið gætur**

Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við kr. 30,- fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Tórsgøtu 1, millum kl. 8.00 og 16.00

**Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á miðdegi 1 dag fyri útkomudag.** Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.

☐ Mán. ☐ Týs. ☐ Mik. ☐ Hós. ☐ Frí.

Tekstur:

**Myndina aftur:** Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði. Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).
Navn:
Bústaður:
Bygd/býur: Tlf.:

Sendið lepan, v/mynd og gjald til:
Sosialurin Postsmoga 76 · 110 Tórshavn
Merkið brævbjálvan: >>Heilsanir<<



**Góða kona**
Her ert tú ung og grøn.
Hjartaliga tillukku við 60 ára degnum.
**Ynskja maður tín**
*P.S. Eg vil siga at við árinum ert tú blivin flottari*



**Góði fitti Olivur**
Hjartaliga tillukku við 1 ára degnum. Vit elska teg.
**Omman og abbin á Sevmýri**



**Góði Eyðfinn**
Hjartaliga tillukku við 5 ára føðingardegnum 17. nov.
**Heilsan mamma, babba og Villiam**



**Góði pápi, verpápi og abbi**
Hjartaliga tillukku við 70 ára degnum tann 17. nov.
Vónandi fært tú ein góðan dag. Harrans signing fyri framtíðina.
**Ynskja børn, svigarbørn og barnabørn**